VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt, men frá um middagsleitið andøvsgul av suðri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið leygardagin:
Fyrrapartin lot av ymsum ættum og ælingur, men út á seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landsynningi og um kvøldið regn. Hitin millum 4 og 7 stig.



Veðrið sunnudagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og regn ella mjørki. Út á seinnapartin minni vindur av útsynningi og sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 7 og 10 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av suðri og útsynningi og stundum regn ella ælingur. Hitin millum 4 og 8 stig.

Ennið tað er fatt

Eins og brimlagrúkurin í Mikladali á sinni lá við fattum enni á bóndans borði, lá ein kópur nú hendan dagin so fittur og át eina ulku á Havnarvág

DJÓRALÍV
Edvard Joensen

Føroyski kópastovnurin er væl fyri, og eisini á havnarvág klára teir at veiða sær ein bita
Mynd: Jens Kristian Vang

Tað ber til at lívbjarga sær soleiðis av og á á Havnarvág, hóast hon er dálkað. Hendan dagin, myndamaður okkara var Úti undir Bakka, stóð hesin kópurin fyri landi við eini ulku í kjaftinum. Hann hevði veitt hana á vágni og bjargað sær hesum døgverðanum.

Kópurin hevur tað gott undir Froyum, sigur Dorethe Bloch á Náttúrugripasavninum.Tó er eingin nágreiniligi kanning gjørd, og tí ber ikki til, at siga heilt neyvt, hvussu nógvur kópur er undir Føroyum. Men ein meting sigur, at teir munnu vera einir 5.000, sigur hon.

Tey eru heldur ikki heilt vís í, um tað nú bara eru føroyskir kópar, vit síggja kring strendurnar.

Hetlendingar hava merkt kóp við satelitsendara, og ein teirra hevur so prógvað at teir ferðast víða, sigur Dorethe Bloch.

Ein merktur hetlendskur kópur svam úr Hetlandi fram við Føroyum og yvir á Suðurlandi, har hann ferðaðist fram við landi eina tíð, áðrenn hann fór aftur til Hetlands.

Dorethe Bloch sigur, at tey kundu hugsað sær at sloppið at sett nakrar satelitsendarar á føroyskar kópar eisini. Men tað fer at bíða, til ráð eru til tess, sigur hon.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	1
Nuuk	3
Qaqortoq	4
Ammassalik	÷1
Saint John's	÷6
Halifax	1
Reykjavík	4
Seyðisfjørður	3
Tórshavn	7
Lerwick	7
Aberdeen	8
London	12
Tromsø	0
Bergen	6
Oslo	–
Stokkhólm	1
Keypmannah.	1
Helsinki	÷4
Moskva	÷2
Berlin	3
Warzawa	÷1
Kiev	÷4
Bukarest	0
Paris	14
Madrid	16
Róm	14
Malorca	17
Athen	10
Malta	16
Tunis	17
Beijing	1
New Dehli	22
Bangkok	35
Jakarta	32
Sydney	–
New York	5
Miami	28
Los Angeles	13
Meksikobýur	–
Panama	33
La Paz	6
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	29

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 986 hPa. við Føroyar fer í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 995 hPa. vestan fyri Írland fer móti Íslandi og dýpist.



Lágtrýstið sunnan fyri Ísland fer eystureftir og lágtrýstið við Írland fer í landnyrðing.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰– 06/03 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 6,3°
Minsti hiti máldur í mars.: ÷8,7° Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 9,0 mm – mált frá 05/03 kl. 06⁰⁰–06/03 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 24,1 mm



VESTFALLSKYRRINDI

3. mars: Tendring
7. mars: Mánin longst frá jørðini
11. mars: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
7. mar	09.41	22.01	08.41	21.01	08.56	21.16	11.41	—	00.22	12.41	07.56	20.16	06.56	19.16	09.56	22.16	10.56	23.16	09.26	21.46	10.41	23.01
8. mar	10.19	22.37	09.19	21.37	09.34	21.52	00.01	12.19	01.01	13.19	08.34	20.52	07.34	19.52	10.34	22.52	11.34	23.52	10.04	22.22	11.19	23.37
9. mar	10.56	23.16	09.56	22.16	10.11	22.31	00.37	12.56	01.37	13.56	09.11	21.31	08.11	20.31	11.11	23.31	—	12.11	10.41	23.01	11.56	—
10. mar	11.40	—	10.40	23.05	10.55	23.20	01.16	13.40	02.16	14.40	09.55	22.20	08.55	21.20	11.55	—	00.31	12.55	11.25	23.50	00.16	12.40

5 707265 100050 >